


IRF

# ÁRSFRÁSØGN 2022

estra
VÁSTI

Svanamerktur prentlutur 541-894

Forsíða: Eyðdis Bjartalíð, sum starvast á brennistøðini
Myndir: Harriet Olafsdóttir, Erla Ziskasen og IRF.

# Innihald


Upplýsingar um felagsskapin ..... 4
IRF fyriskipan ..... 5
Limakommunur og fólkatal ..... 6
Leiðslufrágreiðing ..... 7
Hendingar í árinum ..... 12
- Alt virksemið hjá IRF ISO-góðkent ..... 13
- Tríggir nýggir innsavningarbilar ..... 13
- Nýggja tyrvimóttøkan og reinsiverkið avhendað ..... 14
- IRF sett HR-leiðara ..... 15
- Tiltak um graslíkisvøllir ..... 15
- Hvussu hevur tín grái posi tað? ..... 16
- Magnus starvast meira enn 20 ár hjá IRF ..... 18
- Kunningardagar fyri kommunur ..... 19
- IRF dyrkar sítt egna grønmeti ..... 20
- IRF ment føroyskt tilfar til børn um umhvørvi og burturkast ..... 22
- Nógvar vitjanir á Hagaleiti í 2022 ..... 23
- Hvussu fyrireika Føroyar seg til at handfara brúkt battarí úr el- og hybridbilum á tryggan og skynsaman hátt? ..... 24

Hagtøl 2022 ..... 26
- Hvaðani kemur burturkastið? ..... 28
- Kommunal endurvinningarpláss ..... 28
- Endurvinning ..... 29
- Útflutningur ..... 29
- Jarn og metal ..... 30
- Pappír og papp ..... 31
- Serburturkast ..... 32
- Elektronikkur ..... 32
- Glas ..... 33
- Matolja ..... 34
- Spillolja og oljudálkað vatn ..... 34
- Brenning ..... 35
- Tyrving ..... 37
- Rottangatøming ..... 37
- Ósjónligt burturkast ..... 37

Høvuðstøl ..... 39
Talvur ..... 40
Gongdin í rakstrinum ..... 43
Rakstrarúrslit samanborð við fíggjarætlan ..... 44
Leiðsluátekning ..... 45
Váttan frá óheftum grannskoðara ..... 46
Nýttur roknskaparháttur ..... 48
- Rakstrarroknskapurin ..... 48
- Fíggjarstøða ..... 49

Rakstrarroknskapur ..... 50
Fíggjarstøða ..... 51
Rakstrarroknskapur býttur á økir ..... 52
Notur til roknskapin ..... 53
Gjaldførisfrágreiðing ..... 62
Rakstrarroknskapur fyri oljureinsiverkið ..... 63
Rakstrarroknskapur fyri reinsitænastuna ..... 64
Rakstrarroknskapur fyri verkstaðið ..... 65
Rakstrarroknskapur fyri serhøllina ..... 66
Rakstrarroknskapur fyri endurvinningarskipanina ..... 67




# UPPLÝSINGAR UM FELAGSSKAPIN

### Felagsskapurin

L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin IRF
Víkarvegur 107, 520 Leirvík
irf@irf.fo
www.irf.fo
Tlf: 41 42 43
V-tal: 353477
Heimstaðarkommuna: Eysturkommuna
Starvsfólk: 89 ársverk

### Nevnd

Hans Anders Jacobsen, Eysturoy, formaður
Jóanis Albert Nielsen, Vágar, næstformaður
Gunvá við Keldu, Norðoyggjar, nevndarlimur
Alvi Mortensen, Suðuroy, nevndarlimur
Oluf Müller, Norðstreymoy, nevndarlimur
Bjarki Henriksen, Sandoy, nevndarlimur

### Stjórn

Poul Andrias Joensen, stjóri

### Grannskoðan:

**P/f JANUAR**
Óðinshædd 13
Postsmoga 30, FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 47 00
januar@januar.fo
www.januar.fo

Ársroknskapurin fyri 2022 er góðkendur á ársaðalfundinum, tann ___________ 2023

___________________________________

Fundarstjóri

# IRF fyriskipan

**28 limakommunur**

**Aðalfundur**

**Nevnd**



**Hans Anders Jacobsen**
Eysturoy,
nevndarformaður



**Jóanis Albert Nielsen**
Vágar,
næstformaður



**Gunvá við Keldu**
Norðoyggjar,
nevndarlimur



**Alvi Mortensen**
Suðuroy,
nevndarlimur



**Oluf Müller**
Norðstreymoy,
nevndarlimur



**Bjarki Henriksen**
Sandoy,
nevndarlimur

**Leiðsla**



**Poul Andrias Joensen**
Stjóri



**Jóhannus Danielsen**
Fíggjarleiðari



**Súsanna Berg**
Umhvørvisleiðari

**Deildarleiðarar**



**Andrias Joensen**
Brennistøð,
Tyrvimóttøka
og reinsiverk,
Oljureinsiverk,
Endurvinningarskipan



**Adelbert Ellingsgaard**
Innsavning,
Reinsitænasta



**Torfinn Mortensen**
Innsavning í Suðuroy,
Støðin í Trøllavík



**Petur Højgaard**
Verkstaður

# Limakommunur og fólkatal pr. 1. januar

| Limakommunur-økir | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Norðoyggjar** | | | | | |
| Fugloyar kommuna | 43 | 38 | 41 | 38 | 37 |
| Viðareiðis kommuna | 348 | 354 | 354 | 347 | 361 |
| Hvannasunds kommuna | 428 | 418 | 418 | 416 | 415 |
| Klaksvíkar kommuna | 5.427 | 5.398 | 5.338 | 5.250 | 5.194 |
| Kunoyar kommuna | 150 | 147 | 141 | 156 | 146 |
| **Tilsamans** | **6.396** | **6.355** | **6.292** | **6.207** | **6.153** |
| **Eysturoy** | | | | | |
| Fuglafjarðar kommuna | 1.627 | 1.612 | 1.574 | 1.590 | 1.552 |
| Eysturkommuna | 2.267 | 2.256 | 2.211 | 2.156 | 2.119 |
| Nes kommuna | 1.502 | 1.450 | 1.399 | 1.338 | 1.326 |
| Runarvíkar kommuna | 4.347 | 4.270 | 4.215 | 4.165 | 4.047 |
| Sjóvar kommuna | 1.190 | 1.138 | 1.111 | 1.089 | 1.064 |
| Eiðis kommuna | 809 | 789 | 767 | 762 | 724 |
| **Tilsamans** | **11.742** | **11.515** | **11.277** | **11.100** | **10.832** |
| **Streymoy** | | | | | |
| Sunda kommuna | 1.834 | 1.821 | 1.811 | 1.811 | 1.796 |
| Kvívíkar kommuna | 605 | 601 | 624 | 597 | 592 |
| Vestmanna kommuna | 1.269 | 1.263 | 1.248 | 1.244 | 1.236 |
| **Tilsamans** | **3.708** | **3.685** | **3.683** | **3.652** | **3.624** |
| **Vágar** | | | | | |
| Vága kommuna | 2.184 | 2.163 | 2.140 | 2.130 | 2.086 |
| Sørvágs kommuna | 1.247 | 1.252 | 1.220 | 1.237 | 1.202 |
| **Tilsamans** | **3.431** | **3.415** | **3.360** | **3.367** | **3.288** |
| **Sandoy** | | | | | |
| Sands kommuna | 525 | 527 | 537 | 533 | 521 |
| Skopunar kommuna | 472 | 453 | 454 | 440 | 461 |
| Skálavíkar kommuna | 125 | 138 | 145 | 144 | 139 |
| Húsavíkar kommuna | 103 | 109 | 111 | 115 | 110 |
| Skúvoyar kommuna | 34 | 41 | 43 | 40 | 42 |
| **Tilsamans** | **1.259** | **1.268** | **1.290** | **1.272** | **1.273** |
| **Suðuroy** | | | | | |
| Hvalbiar kommuna | 666 | 679 | 670 | 679 | 675 |
| Tvøroyrar kommuna | 1.774 | 1.769 | 1.744 | 1.716 | 1.714 |
| Fámjins kommuna | 79 | 84 | 86 | 83 | 79 |
| Hovs kommuna | 104 | 102 | 97 | 99 | 101 |
| Porkeris kommuna | 332 | 317 | 319 | 318 | 319 |
| Vágs kommuna | 1.364 | 1.380 | 1.391 | 1.345 | 1.342 |
| Sumbiar kommuna | 343 | 357 | 350 | 358 | 363 |
| **Tilsamans** | **4.662** | **4.688** | **4.657** | **4.598** | **4.593** |
| **IRF TILSAMANS** | **31.198** | **30.926** | **30.559** | **30.196** | **29.763** |



# Leiðslufrágreiðing

## Inngangur

Samstundis sum fólkatalið í Føroyum støðugt veksur, gerast føroyingar eisini alsamt meira umhvørvistilvitaðir. Hetta merkir, at tey krøv, ið verða sett bæði vinnulívi og politiska myndugleikanum í mun til umhvørvið, støðugt herðast.

Somuleiðis verða sjálvsagt eisini størri krøv sett til handfaringina av burturkasti í Føroyum, og seinastu árini hjá IRF hava eisini verið nógv merkt av byggivirksemi. Nýggir bygningar og støðir eru komin afturat, eins og verandi umstøður verða dagførdar og nútímansgjørdar. Um tikið verður saman um størru verkætlanirnar seinastu árini, so varð stóra umvælingin av ovninum á brennistøðini liðug í 2018, nýggja móttøkuhøllin á Hagaleiti varð liðug fyrst í 2020, og sama ár flutti umsitingin hjá IRF í nýggjan skrivstovubygning á Hagaleiti. Í 2021 og 2022 eru kontrollrúm, skifti- og brúsurúm á brennistøðini umvæld. Í 2022 hevur nógv arbeiði annars verið lagt í at fáa nýggju støðina í Nýggjheiðum, sum varð avhendað í januar 2023, lidna.

Í 2022 komu 37.955 tons av burturkasti inn til IRF, og hetta er 10% minni enn árið fyri. Burturkastnøgdirnar hava ikki verið so lágar síðan 2017. Hóast støðugur fólkavøkstur hevur verið í Føroyum seinastu árini, framleiða vit eftir øllum at døma ikki lutfalsliga meira burturkast. Minkandi burturkastnøgdir verða ofta mettar at vera ein tann fyrsta ábendingin um, at ferðin í samfelagnum er sett niður. Nakrar av orsøkunum kunnu vera hækkandi kostnaðarstøði seinasta árið, hækkandi bankarentur umframt avleiðingar av krígnum í Ukraina, sum nú hevur vart í meira enn eitt ár.

Seinasta árið er kostnaðarstøðið hækkað munandi kring allan heimin, og inflatiónin hevur verið methøg. Føroyska prístalið er hækkað við uml. 10% í 2022. Sambært Hagstovu Føroya er hetta størsta árliga broytingin í prístalinum seinastu 14 árini.

Hækkaða kostnaðarstøðið merkist eisini væl hjá IRF, og tað sæst millum annað í lønar- og rentuhækkanum, umframt prísvøkstri á vørum og tænastum. Búskaparliga royndist 2022 hjá IRF tískil verri enn mett frammanundan og væl verri enn árið fyri.

## Búskaparliga gongdin

Rakstrarúrslitið fyri 2022 er 0,2 mió. kr. í avlopi. Í rakstrarætlanini er roknað við 1,9 mió. kr. í avlopi. Sostatt er úrslitið 1,7 mió. verri, enn roknað var við.

Inntøkurnar eru 3,4 mió. kr. størri enn mett, annar uttanhýsis kostnaður er 4,4 mió. kr. størri, og starvsfólkakostnaður er 2 mió. kr. størri enn mett frammanundan. Avskrivingarnar eru 0,8 mió. kr. minni enn mett, og renturnar eru 0,5 mió. kr. minni.

Í 2022 gjørdi IRF íløgur fyri tilsamans 59,3 mió. kr. Í 2021 vóru íløgur gjørdar fyri 62,0 mió. kr.

Roknskapirnir fyri oljureinsiverkið, reinsitænastuna, verkstaðið, serhøllina og endurvinningarskipanina eru við í høvuðsroknskapinum, men eru samstundis settir upp í egnum skjølum í ársfrágreiðingini.

Bruttoúrslitið fyri 2022 gjørdist 65,5 mió. kr., sum er 0,7 mió. kr. verri enn í 2021. Ársúrslitið gjørdist 0,2 mió. kr. í avlopi, sum er 4,3 mió. kr. verri enn í 2021.

Fíggjarstøðan javnvigar við 304 mió. kr. í 2022 í mun til 266 mió. kr. í 2021.



## Burturkastnøgdin

Í 2022 tók IRF ímóti 37.955 tonsum av burturkasti. Hetta er sum nevnt ein lækking á 10% í burturkastmongdunum samanborið við 2021.

Av teimum 37.955 tonsunum, sum IRF tók ímóti í 2022, vórðu 61,6% brend, 31,7% fóru til endurvinningar og 6,7% vórðu tyrvd. Ein minking er í øllum bólkum, og størsta minkingin er í nøgdunum av tyrviburturkasti, sum minkaðu við 20%. Býtið millum hesar tríggjar viðgerðarhættirnar hevur verið støðugt seinastu 5 árini.

## Útflutningurin

IRF sendir nógvar ymiskar burturkastbólkar av landinum til endurvinningar. Sum talvan á síðu 28 vísir, er samlaði útflutningurin í 2022 7.180 tons, sum er 14% minni enn í 2021, tá útflutningurin var 8.306 tons.

Stóri munurin í tølunum fyri endurvinning kemst serliga av, at IRF í 2022 hevði tvær avskipingar av jarni, meðan tað í 2021 vóru tríggjar avskipingar. Tað vanliga er, at IRF avskipar jarn tvær ferðir árliga.

Hóast minni varð sent av landinum til endurvinningar í 2022 enn í 2021, hava góðu sølurísirnir í 2022 havt við sær, at endurvinningarskipanin gav eitt munandi avlop í 2022, eins og hon eisini gjørdi í 2021.

Avlopið av endurvinningarskipanini í 2022 var 2,8 mió. kr., ímóti 3,2 mió. kr. í 2021.

Seinasta hálva árið eru sølurísirnir lækkaðir á fleiri bólkum av endurvinningartilfari, og tí skil kann ikki væntast, at úrslitið av endurvinningarskipanini verður líka gott í 2023 sum í 2022 og 2021.

## Limakommunur og fólkatal

1. januar 2023 vóru vit 54.255 fólk í Føroyum, harav 31.198 búðu í limakommunum hjá IRF. Í limakommununum eru hetta 272 fólk fleiri enn við ársbyrjan 2022. Vit uppliva enn tilflyting í Føroyum, og IRF roknar við øktum fólkatali í langtíðarætlan felagsins.

## Limagjald

Á seinasta aðalfundi varð avgjørt, at limagjaldið fyri 2023 skuldi vera tað sama sum í 2022, 1.325 kr. fyri hvønn borgara. Av hesum eru 1.122 kr. fyri ruskgjald, og 203 kr. eru fyri rottangagjald.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Eftir roknskaparlok er einki hent, sum broytir metingina av fíggjarstøðu felagsins.

## Nýtt felags renovatiónsfelag í Føroyum

Í løtuni verður arbeitt við at stovna eitt nýtt renovatiónsfelag, sum allar kommunur í Føroyum kunnu verða limir í. Ætlanin er, at virksemið hjá IRF og KB verður lagt í nýggja felagið. Fyri IRF merkir tað, at alt virksemi og øll starvsfólk halda fram í nýggja felagnum, og at allar ognir og skyldur hjá IRF verða fluttar í nýggja felagið. Eftir ætlanini verður nýggja felagið stovnað seinni í ár.

## Rakstrarváðar

Seinnu árini hevur verið fólkavøkstur og viðgongd í búskapinum í Føroyum. Hetta hevur havt hækkandi inntøkur við sær hjá IRF. Seinasta árið hevur inflatiónin verið høg, og hetta hevur havt við sær, at útreiðslurnar hjá IRF eru nógv øktar. Um gongdin seinasta árið heldur fram, og tað kemur afturgongd í føroyska búskapin, kann væntast, at inntøkan minkar.

IRF fylgir væl við búskapargongdini, so tað eisini í framtíðini er samsvar millum inntøkur og útreiðslur hjá felagnum.

IRF hevur ikki týðandi upphæddir útistandandi hjá einstøkum skuldara. Skuldarar felagsins halda sum heild væl sínar skyldur, men um afturgongd verður í búskapinum, kann tað hava við sær, at gjaldsevnini hjá skuldarunum versna. Tað kann hava ávirkan á gjaldførið hjá felagnum. IRF fylgir væl við gongdini í útistandandi og hevur greiðar mannagongdir á skuldaraøkinum. Renturnar á lánunum hjá felagnum eru bæði fastar og broytiligar. Vandi er við broytiligum rentum, og felagið fylgir væl við gongdini á rentuni.

## Samfelagsábyrgd og menning

Samfelagsábyrgd er partur av øllum virkisætlanum hjá IRF. Felagið lagar seg til broytt og herd umhvørviskrøv uttanífrá, t.d. úr DK og ES, í sambandi við lógarbroytingar av burturkastviðgerð, útláti og orkunýtslu. IRF hevur góðar førleikar á burturkast- og umhvørvisøkinum og vil ganga undan at menna starvsfólk felagsins, so tey eru útbúgvin og tilvitað um hesa samfelagsábyrgd, sum IRF átekur sær.

Broytt lógar- og samfelagskrøv, menning, tillagingar og broytingar á burturkast- og umhvørvisøkinum kunnu hava útreiðslur við sær, sum dýrka um rakstur felagsins.



## Íløgur

Í 2022 hevur IRF gjørt íløgur fyri 59,3 mió. kr., og hetta eru 6,5 mió. kr. minni enn mett frammanundan. Høvuðsorsøkin til hendan munin er, at íløgan í Nýggjheiðum bleiv minni enn mett, og at arbeiðið við dagføringini av verkstaðnum í Klaksvík ikki kom í gongd í 2022.

## Tyrvimóttøka og reinsiverk í Nýggjheiðum

Nýggja tyrvimóttøkan og reinsiverkið í Nýggjheiðum í Kvívík varð avhendað fyrst í 2023. Samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina er ikki endaliga uppgjørdur enn, men um ársskiftið var íløgan komin upp á knappar 120 mió. kr.

IRF tók í 2019 eitt lán til verkætlanina upp á 120 mió. kr, og hetta lánið er í 2022 hækkað til 130 mió. kr.

Nýggja støðin í Nýggjheiðum er eitt dømi um, hvussu IRF áhaldandi arbeiðir við at menna innsavningar- og viðgerðarhættir, soleiðis at hesi gerast umhvørvisvinarligari. Við nýggju tyrvihøllini eru betri møguleikar



at skilja og hagreiða burturkast innandura, inntil veður er at tyrva tað. Soleiðis kunnu vit í størri mun fyribyrgja, at burturkast fýkur og dálkar umhvørvið. Reinsiverkið í Nýggjheiðum er eisini umhvørvisliga sæð eitt stórt stig á grønu kósini. Reinsiverkið gevur góðar møguleikar at skilja plast og annað óviðkomandi tilfar frá evjuni, áðrenn hon verður tyrvd, og á tann hátt hava vit fingið eina betri viðgerð av rottangaevjuni, enn vit høvdu við gomlu skipanini við evjubrunnum.

### Verkstaðið í Klaksvík

Í nógv ár hevur IRF leigað eitt verkstað í Klaksvík til umvælingar og viðlíkahald av IRF-bilum og bingjum. Í 2021 ynskti eigarin av verkstaðnum at selja verkstaðið, og í desember 2021 samtykti IRF at keypa tað. Keypið fór fram í februar 2022. Samtykt er eisini at útbyggja verkstaðið nakað og at dagføra útiøkið, sum m.a. er móttøka fyri burturbeind akfør. Ætlanin var, at hetta arbeiðið skuldi gerast í 2022, men tað er útsett til at byrja í mars 2023. Samlaða íløgan er mett til 10,5 mió. kr. Ætlanin er eisini at fara undir at dagføra sjálvt verkstaðið, men enn er støða ikki tikin til, nær tað verður.

### Brennistøðin

Í 2022 eru fleiri starvsfólkarúm á brennistøðini umvæld. Hesi rúmini hava ikki verið umvæld, síðan brennistøðin varð tikin í nýtslu í 1989. Talan var um gongd, skifti- og brúsurúm, umframt gamla starvsfólkakøkin, sum nú er gjørdur til skifti- og brúsurúm til kvinnur. Dagføringin kostaði 1,1 mió. kr.

### Endurvinningarhøllin

Dagliga virksemið í endurvinningarhøllini er nógv økt seinastu árini. Endurvinningarhøllin tekur ímóti pappi, pappíri, bleytum plasti, pantfløskum (PET), aluminiumsdósum og stórsekkjum. Hagtølini fyri 2022 vísa ein vøkstur í fleiri av endurvinningarbólkunum, sum verða hagreiddir í endurvinningarhøllini. Økt virksemi slítur sjálvsagt útgerðina, og í 2022 vórðu transport- og skiljibondini útskift. Tey gomlu bondini høvdu ofta tørv á viðlíkahaldi, og hetta hevði nógvar arbeiðsteðgir við sær. Nýggju bondini kostaðu 0,8 mió. kr.

### Útiøkið á Hagaleiti

Í 2022 er nakað av arbeiði eisini gjørt uttanfyri á Hagaleiti. Vegurin til skrivstovubygningin er broyttur nakað, eins og parkeringsøkir eru gjørd. Við asfaltering og verjugarði er samlaði kostnaðurin 1,4 mió. kr.

### Akfør

Stórur partur av virkseminum hjá IRF er innsavnan og flutningur av burturkasti. IRF hevur gjøgnum árini gjørt íløgur í nógv ymisk akfør, sum dagliga hava nógv virksemi og m.a. koyra nógv. Akførini krevja sjálvandi nógv viðlíkahald, og tørvur er eisini regluliga á at endurnýggja og keypa fleiri akfør.

Í 2022 fekk IRF tríggjar nýggjar posabilar til meginøkið og ein kranabil til Suðuroynna. Harumframt er ein av bilunum til innsavning av spillolju og oljudálkað vatn vorðin høvuðsumvældur í Danmark. Samlaðu akfarsíløgurnar í 2022 vóru 7,9 mió. kr.

IRF hevur bílagt tríggjar bilar afturat til meginøkið, sum í høvuðsheitum eru ætlaðir til flutning av stórum bingjum.

### Alt virksemið hjá IRF ISO-góðkent

Á sumri 2022 varð innan- og uttanhýsis ISO-skoðan framd hjá IRF, og allar deildir hjá IRF eru góðkendar sambært ISO-14001 fram til juli 2025.

Alt virksemið hjá IRF fekk á fyrsta sinni ISO-góðkenning í 2021, tí árini frammanundan vóru tað bara tvær deildir hjá IRF, oljureinsiverkið og serhøllin, sum vóru umfataðar av umhvørvisstýrisskipanini ISO-14001. Umframt at allar støðirnar hjá IRF nú eru ISO-góðkendar, hevur IRF stýrisskipan til arbeiðið við heimsmálunum. Hendan stýrisskipan er knýtt at ISO-góðkenningini og áleggur IRF at seta málbar mál sambært umhvørvispolitikk felagsins.

## Endi

Hóast tilverugrundarlagið hjá IRF er at innsavna og viðgera burturkast á umhvørvisliga rættan hátt, er tað eisini ein av fremstu uppgávum felagsins at upplýsa um fyribyrging og endurnýtslu av burturkasti. Tað er sera týdningarmikið, at tað í størri mun verður hugsað um, hvussu vit – bæði borgarar, vinnan og politisku myndugleikarnir – kunnu vera við til at minka um, hvussu nógv burturkast verður framleitt. Tess minni verður framleitt, tess minni burturkast verður at hagreiða.

Lyklahugtøkini í hesum sambandi eru ábyrgdarfull nýtsla og framleiðsla. Tað er týdningarmikið at vera tilvitaður um nýtsluvanar og innkeyp. Tað snýr seg um at keypa skynsamt og um at velja at keypa frá fyritøkum, sum hava eina burðardygga framleiðslu. At Føroyar liggja fjarskotnar merkir, at innfluttar vørur ofta hava ferðast langt fyri at koma higar, og hetta hevur bæði nógv útlát eins og nógv pakkitilfar við sær. Tí er tað ein stórur umhvørvisligur vinningur at keypa stuttfluttar vørur. At ársins orð í Føroyum gjørdist "stuttflutt", kann sigast at vera ein ábending um, at hetta er nakað, sum føroyingar gerast alsamt meira tilvitaðir um.

Umframt at uppraðfesta fyribyrging og endurnýtslu av burturkasti, verður alsamt meira orka løgd í at kunna um týdningin av at skilja burturkast frá til endurvinningar. Tað eru nógv privat húsarhald, stovnar og arbeiðspláss, sum kundu skilt burturkastið betur. Tað er sera týdningarmikið, at tilfeingið í burturkastinum, sum kemur inn til IRF, í størsta mun verður endurvunnið og hildið í ringrás. Ein avbjóðing í hesum sambandi er at uppraðfesta skiljing á arbeiðsplássum og byggiplássum sum heild, og ein onnur avbjóðing er, at tað er sera nógv burturkast, sum ikki ber til at endurvinna. Her er neyðugt við nýhugsan og áræði frá øllum framleiðslufyritøkunum – bæði føroyskum og útlendskum, og bæði hvat viðvíkur framleiðslu av vørum og pakkitilfari. Framleiðslufyritøkur eiga sum tað fyrsta at hugsa um burðardygd og endurvinning, soleiðis at alt, sum tær framleiða, kann endurvinnast, tá ið tað er vorðið burturkast. At hugsa um ringbúskap á framleiðslustigi er eitt evni, sum er farið at fylla alsamt meira í grannalondum okkara, og hetta er eitt sera viðkomandi evni. Tann, ið framleiðir vøruna, hevur ábyrgdina av, at vøran verður burðardygt framleidd, og hon verður framleidd á slíkan hátt, at hon letur seg endurvinna.

Sum einstaklingar og sum samfelag eiga vit í størri mun at tillaga okkum eftir hugsjónini handan burturkasttrappuna, har vit hugsa meira um fyribyrging, endurnýtslu og endurvinning og minni um brenning og tyrving av burturkasti. Vit mugu duga betur at minka um burturkastnøgdirnar og í størri mun at endurnýta. Vit mugu gerast betri til at nýta tær skiljiskipanir, sum longu eru settar í verk, og hetta er galdandi bæði við hús og á arbeiðsplássunum kring landið.

Við ISO-góðkenningunum átekur IRF sær at arbeiða við munadyggum loysnum innan fyribyrging, innsavning, hagreiðing av burturkasti frá borgarum og virkjum. Umhvørvispolitikkurin hjá IRF, sum tekur støði í seks av teimum 17 heimsmálunum hjá ST fyri burðardygga menning, útgreinar kós felagsins í arbeiðinum fram ímóti at gera Føroyar reinari og burðardyggari.

Hendan uppgávan, og ikki minst ábyrgdin, er stór, men um politiski myndugleikin saman við føroyingum vísir viljan, fer at bera á mál – komandi ættarliðum at frama.






# HENDINGAR Í ÁRINUM

# Alt virksemið hjá IRF **ISO-góðkent**


DNV

LEDELSESSYSTEM CERTIFIKAT

Certifikat nummer:
203834-2016-AE-DEN-DANAK

Første certificering:
13. juli 2016

Gyldighedsperiode:
09. juli 2022 – 08. juli 2025

Det attesteres hermed, at ledelsessystemet hos
**IRF**
Vikarvegur 107, FO-520, Leirvík, Faroe Islands
og lokationer nævnt i Appendiks til dette certifikat

opfylder kravene i ledelsessystemstandarden for miljø:
**ISO 14001:2015**

Dette certifikat er gældende for følgende område:
**Bæredygtig ressourceudnyttelse gennem udvikling og drif…**
**forebyggelse, indsamling, behandling og afsætning af affa…**

Sted og dato:
Hellerup, 05. juli 2022

Manglende opfyldelse af betingelser i certificeringskontrakten kan gøre certifikatet ugyldigt…
AKKREDITERET enhed: DNV Business Assurance Denmark A/S, Tuborg Parkvej 8, DK-…

DNV

LEDELSESSYSTEM CERTIFIKAT

Certifikat nummer:
10000474798-MSC-DNV-DNK

Første certificering:
06. oktober 2021

Gyldighedsperiode:
09. juli 2022 – 08. juli 2025

Det attesteres hermed, at ledelsessystemet hos
**IRF**
Vikarvegur 107, FO-520, Leirvík, Faroe Islands
og lokationer nævnt i Appendiks til dette certifikat

opfylder DNV kravene til implementering af FN's bæredygtige udviklingsmål og har valgt og prioriteret følgende FN SDG'er:

**SDG 6 Sikre at alle har adgang til vand og sanitet og at dette forvaltes bæredygtigt**
**Delmål: 6.3 & 6.b**

**SDG 7 Sikre at alle har adgang til pålidelig, bæredygtig og moderne energi til en overkommelig pris**
**Delmål: 7.2**

**SDG 12 Sikre bæredygtige forbrugs- og produktionsformer**
**Delmål: 12.4, 12.5 & 12.8**

**SDG 13 Handle hurtigt for at bekæmpe klimaforandringer og deres konsekvenser**
**Delmål: 13.3**

**SDG 14 Bevare og sikre bæredygtigt brug af verdens have og deres ressourcer**
**Delmål: 14.1**

**SDG 17 Styrke det globale partnerskab for handling og øg midlerne til at nå målene**
**Delmål: 17.16, 17.17**

Sted og dato:
Hellerup, 05. juli 2022

For udstedende enhed:
DNV - Business Assurance
Tuborg Parkvej 8, 2., 2900 Hellerup, Denmark

Jesper Schultz
Adm. Direktør

Manglende opfyldelse af betingelser i certificeringskontrakten kan gøre certifikatet ugyldigt.
CERTIFYING UNIT: DNV Business Assurance Denmark A/S, Tuborg Parkvej 8, 2., 2900, Hellerup, Denmark
TEL: +45 39 45 48 00. www.dnv.dk/assurance

Á sumri 2022 varð innan- og uttanhýsis ISO-skoðan framd hjá IRF, og nú eru allar deildir hjá IRF góðkendar sambært ISO-14001 fram til juli 2025.

Alt virksemið hjá IRF fekk á fyrsta sinni ISO-góðkenning í 2021. Árini frammundan vóru tað bara tvær deildir hjá IRF, oljureinsiverkið og serhøllin, sum vóru umfataðar av umhvørvisstýrisskipanini ISO-14001.

Umframt at allar støðirnar hjá IRF eru ISO-góðkendar, hevur IRF stýrisskipan til arbeiðið við heimsmálunum. Hendan stýrisskipan er knýtt at ISO-góðkenningini og áleggur IRF at seta málbar mál sambært umhvørvispolitikk felagsins. Umhvørvispolitikkurin hjá IRF tekur støði í seks av teimum 17 heimsmálunum hjá ST fyri burðardygga menning, og hann útgreinar kós felagsins í arbeiðinum fram ímóti at gera Føroyar reinari og burðardyggari.

Við ISO-góðkenningunum átekur IRF sær at arbeiða við munadyggum loysnum innan fyribyrging, innsavning, viðgerð og hagreiðing av burturkasti frá borgarum og virkjum.

# **Tríggir nýggir** innsavningarbilar




Í 2022 keypti IRF tríggjar nýggjar Scania-bilar, sum savna gráar, hvítar og reyðar posar inn frá húsarhaldum í miðøkinum. Útskiftingin var tiltrongd, tí gomlu bilarnir vóru 10 ára gamlir og væl brúktir.

Nýggju bilarnir eru tvídeildir og savna tí bæði hvítar posar við pappíri og pappi til endurvinning, umframt gráar posar við vanligum húsarhaldsruski. Harafturat er eisini eitt rúm til reyða posa við serliga dálkandi burturkasti.

Nýggju bilarnir hava framkomna tøkni, bæði hvat viðvíkur trygdarskipan, umhvørvi og fíggjarliga. Tað hóskar væl til umhvørvispolitikkin hjá IRF í arbeiðinum fram ímóti at gera Føroyar reinari og burðardyggari, at hesir nýggju bilarnir eisini kunnu nýta biodiesel sum brennievni.



# NÝGGJA TYRVIMÓTTØKAN OG REINSIVERKIÐ AVHENDAÐ

Týsdagin, 10. januar 2023, var avhendingin av nýggju tyrvimóttøkuni og reinsiverkinum úti í Nýggjheiðum í Kvívík. Á støðini er móttøka av tyrviburturkasti, reinsiverk til rottangaevju, tyrvingarpláss til tyrviburturkast og eitt tyrvingarpláss til reinsaða rottangaevju.

Tað var í desember 2019, at IRF og Tórshavnar kommuna gjørdu samstarvsavtalu um felags viðgerð av tyrviburturkasti og rottangaevju, og arbeiðið, sum byrjaði í 2020, hevur gingið eftir ætlan. PB Consult hevur verið høvuðsráðgevi, og J&K Petersen hevur staðið fyri bygginini saman við undirveitarum.

Nú byggingin er liðug, verður fyrsta tíðin brúkt til royndarkoyringar, men skjótt væntast støðin at koyra eftir ætlan, og frameftir verður viðgerð av øllum tyrviburturkasti og allari rottangaevju úti í Nýggjheiðum.

### Væl avgreitt arbeiði

Í sambandi við avhendingina takkaði Pætur Húsgarð frá PB Consult IRF fyri stóra álitið, sum varð víst teimum at fáa loyvi at standa á odda fyri hesi spennandi verkætlan.

Áðrenn arbeiðið varð boðið út, varð drúgt kanningararbeiði gjørt til røttu staðsetingina, umframt at fáa øll loyvi til vega.

Fyrsta byggistigið, sum umfataði innistiking av tyrvingarplássi, uppsamlingarveitir og leiðingararbeiði, varð boðið út á heysti 2019 og avhendað í maimánaði 2020. Annað byggistig, sum var spreinging og planering fyri bygningunum v.m., varð avhendað á heysti 2020. Triðja og seinasta byggistig varð boðið út á sumri 2020, og sáttmálin um høvuðsarbeiðstøku varð undirskrivaður 1. september 2020. J&K Petersen hevur staðið fyri øllum trimum byggistigum.

Avbjóðingar hava verið vetrarmánaðirnar við nógvum kava og vánaligum veðri, men kortini varð arbeiðið avhendað til tíðina og innan fyri avtalaða fíggjarkarmin.

### Um verkætlanina

Staðsetingin av nýggju støðini er vald út frá tí góða og slætta lendinum í Nýggjheiðum í Kvívík, og so liggur støðin eisini í hóskandi frástøðu frá bygdum øki. Nógv orka er løgd í at laga verkætlanina so væl til lendið sum gjørligt.

Umframt at gera økið klárt at taka ímóti tyrviburturkasti og rottangaevju eru tríggir bygningar bygdir á økinum. Ein høll at savna saman tyrviburturkast, eitt reinsiverk til rottangaevju umframt eitt bilhús til rottangabilar.

Nýggja tyrvingarplássið verður mett at kunna nøkta tørvin komandi 30 árini. Hetta skal sjálvandi takast við ávísum fyrivarni, tí tað er treytað av samfelagsgongdini og menningini á burturkast- og endurvinningarøkinum sum heild.



*Nýggja reinsiverkið í Nýggjheiðum til viðgerð av rottangaevju.*

# **IRF** sett HR-leiðara



Suffía Høj byrjaði sum HR-leiðari hjá IRF 1. februar í 2022. Eftir at havt eitt HR-fólk í parttíðarstarvi í eitt ár varð avgerð tikin um at seta ein HR-leiðara fulla tíð.

Suffía hevur ábyrgdina av starvsfólkaviðurskiftum, eitt nú starvssetanum, starvsfólkamenning, trivnaðarátøkum og viðlíkahaldi av HR-skipanini.

„Starvsfólkini hjá IRF eru tað avgerandi tilfeingið, sum á ágrýtnan hátt gera Føroyar meira grønar, og tí er tað týdningarmikið, at starvsfólkini framhaldandi trívast og mennast," sigur Suffía. Seinasta árið eru m.a. árligar starvsfólkasamrøður settar á skrá, har endamálið er at seta menning, trivnað og arbeiðsumstøður hjá einstaka starvsfólkinum í fokus. Skipað hevur verið fyri skeiðum innan m.a. fyrstuhjálp, sálarligt arbeiðsumhvørvi og innan ergonomi.

Harumframt hevur IRF nú eisini fingið eina starvsfólkahandbók, hvørs endamál er at skapa trivnað og greiðar reglur á arbeiðsplássinum og at geva starvsfólki og leiðslu kunning um møguligar spurningar um starvsfólkaviðurskifti. Handbókin inniheldur t.d. upplýsingar um arbeiðstíð, frítíð, fráveru, sjúku, tryggingar og uppsøgn. Handbókin er ætlað sum ein handbók at leita í, og frameftir er ætlanin eisini, at hon verður brúkt sum partur av upplæringini, tá nýggj starvsfólk byrja hjá IRF.

Í umhvørvispolitikkinum hjá IRF stendur, at IRF skal vera eitt av Føroya bestu arbeiðsplássum, har starvsfólkini trívast. IRF hevur á leið 100 starvsfólk, og tað hevur nógva umsiting og nógv samskifti við sær, og tí var tað av alstórum týdningi, at HR-økið varð uppraðfest, og at ein HR-leiðari varð settur.

# Tiltak um graslíkisvøllir

Í heyst skipaðu Kommunala Brennistøðin og IRF fyri einum fyrilestri um útskifting og burturbeining av graslíkisvøllum. Kommunala Brennistøðin og IRF hava síðani 2020 sent graslíkisvøllir til donsku fyritøkuna, Re-match, til endurvinningar.

Á tiltakinum greiddi Søren Østergaard frá Re-match frá teirra virksemi, og hvussu vøllirnir skulu útskiftast og pakkast fyri at hóska seg til teirra vinning.

Síðani greiddi Frank Hansen frá Tórshavnar kommunu frá, hvussu arbeiðið verður lagt til rættis, tá ið ein graslíkisvøllur skal skiftast út. Tað er týdningarmikið, at arbeiðið er væl skipað við hjálparfólkum og maskinum, og veðurviðurskiftini hava eisini stóra ávirkan á arbeiðið.

At enda hevði Sølvi Reinert Hansen frá Runavíkar kommunu eina framløgu um, hvussu kommunan, tá ið graslíkisvøllurin við Løkin varð skiftur fyrr í ár, skipaði arbeiðið soleiðis, at gamli vøllurin fer at verða endurnýttur til fleiri smærri vøllir í bygdunum í kommununi.

IRF heitir á allar kommunur og feløg, sum í næstum fara undir at fyrireika eina útskifting av graslíkisvøllum, um at seta seg í samband við ávikavist IRF ella KB, soleiðis at farið verður rætt fram.



# Hvussu hevur tín grái posi tað?

Hvørja viku heinta innsavnarar frá IRF gráa posan, og vit varnast alt fyri eitt, hvussu týdningarmikið innsavningararbeiðið er, um ruskið av onkrari orsøk ikki verður heintað.

Í 2022 varpaði IRF ljós á gráa posa við stuttfilmi og øðrum talgildum og prentaðum upplýsingartilfari, sum kunnar borgarar um, hvussu grái posin fær bestu umstøður at virka undir, og hvussu innsavnararnir fáa betri arbeiðsumstøður.

Endamálið við kunningarátakinum var at fáa borgararnar at kanna, um grái posin lýkur krøvini í dagførdu reglugerðini, sum limakommunurnar hjá IRF samtyktu í 2021. Reglugerðin kann lesast á heimasíðuni hjá IRF.

### Minnist til at skilja í hvíta og reyða posa

Við átakinum varð eisini gjørt vart við, at tað bert er restburturkast, sum skal í gráa posa, og at tað tí er týdningarmikið at skilja burturkast í hvíta og reyða posa eisini. Alt ruskið, sum fer í gráa posa, verður brent, meðan tað, sum tú letur í hvíta og reyða posa, verður sent til endurvinningar ella aðra serliga viðgerð uttanlands.






### Fært tú 10 røtt?

Ein annar liður í nýggja kunningarátakinum var húsarhaldsarkið „Fært tú 10 røtt?", sum varð borið út til øll hús í limakommununum hjá IRF. Á arkinum var ein listi, sum legði upp til, at øll skuldu kanna, um teirra grái posi hevði røttu umstøðurnar at virka undir:

- Grái posin skal hava egið stativ uttan fyri húsini. Stativið skal standa á sjónligum stað frá koyrivegi.
- Stativið má í mesta lagi standa 20 metrar frá koyrivegi.
- Bert eitt ruskstað skal vera á hvørjari ogn.
- Posin skal vera ein gráur IRF-posi.
- Gonguleiðin til stativið skal vera sløtt, ljós og ruddilig. Tá ið hált og kavi er, skal gonguleiðin vera ruddað og trygg at ganga á.
- Einki spískt má latast beinleiðis í gráa posan.
- Bint knút á smáu ruskposarnar, áðrenn tú letur teir í gráa posan.
- Grái posin má í mesta lagi viga 20 kg.
- Grái posin má ikki fyllast upp um strikuna, sum gongur tvørtur um posan í erva.
- Hundar og onnur djór mugu ikki vera til ampa fyri innsavnaran.

Aftrat hesum hava innsavnararnir havt nakrar sokallaðar fráboðanarseðlar at heingja á ruskstativið, um umstøðurnar ikki eru í lagi.




*Í heyst fekk Magnus Vatnhamar Olsen handað blómu-
tyssi fyri at hava starvast hjá IRF í meira enn 20 ár.*

# Magnus starvast meira enn 20 ár hjá IRF

Í heyst fekk Magnus Vatnhamar Olsen handað blómutyssi fyri at hava starvast hjá IRF í meira enn 20 ár. Magnus ger eitt megnararbeiði í endurvinningarhøllini hvønn dag, har hann skilir plast, papp og pappír, og annars heldur høllina ruddiliga og reina.

37 ára gamli leirvíkingurin er við sínum lætta lyndi ein fongur fyri IRF, og bæði leiðsla og starvsfólk fegnast um at hava hann sum starvsfelaga.

Yrkisleiðin hjá Magnusi er eitt frálíkt dømi um, hvussu eitt tillagað starv kann skipast sum eitt samstarv millum tey avvarðandi, arbeiðsplássið og Almannaverkið. Eitt samstarv, sum foreldur Magnusar tóku stig til, og eitt samstarv, sum hevur riggað í meira enn 20 ár.

## Starvslæra, sum bleiv til eitt fast starv

Tá Magnus var liðugur við 7. flokk í Leirvíkar skúla, setti mamma hansara, Eyðvør Vatnhamar, seg í samband við IRF fyri at hoyra, um tað var møguligt hjá Magnusi at koma í starvslæru úti á Hagaleiti. Bæði leiðslan í IRF og stuðlarnir, sum Magnus hevði í skúlanum, tóku væl ímóti hugskotinum.

Stuðlarnir hjá Magnusi, sum vóru Lena Jacobsen, Símun Berg og Dánjal Eysturstein, skiftust at vera við honum til arbeiðis úti í endurvinningarhøllini, og saman við IRF-starvsfólkunum lærdu tey Magnus um burturkast og skilјing.

Starvslæran hilnaðist so mikið væl, at Magnus fekk bjóðað fast starv hjá IRF. „Arbeiðið hjá Magnusi hevði ikki verið til, um arbeiðspláss, starvsfelagar, skúli og stuðlar ikki vóru so rúmlig og vístu vælvild," greiðir Eyðvør frá. Hon leggur tó eisini aftrat, at fyri at fáa tílík samstørv í lag mugu tey avvarðandi eisini duga at síggja møguleikar og góðtaka, at t.d. arbeiðsmøguleikar og løn avspeglast av, at talan er um eitt tillagað starv.

## Stór, persónlig menning

Magnus er vorðin meira ábyrgdarfullur og sjálvbjargin eftir hesa tíðina hjá IRF. Arbeiðið hevur stóran týdning fyri hann, tí tað gevur honum ein meiningsfullan gerandisdag. Hann fer glaður upp til arbeiðis hvønn morgun, og hann hevur nógv vinfólk á arbeiðsplássinum. „Eg havi tað ordiliga gott hjá IRF. Mær dámar væl allar arbeiðsuppgávurnar, men tað besta er at vera á gólvinum og taka mær av plastposunum og teimum hvítu posunum," greiðir Magnus frá.

## Ein raskur og trúgvur starvsfelagi

Magnus og Poul Samuelsen hava arbeitt saman øll árini hjá IRF. Seinastu árini hevur Magnus havt



*Poul Samuelsen og Magnus Vatnhamar Olsen hava arbeitt saman øll árini hjá IRF.*



*Magnusi dámar best at vera á gólvinum og taka sær av plastposunum og teimum hvítu posunum.*

høvuðsábyrgdina av øllum tí bleyta, plastinum, sum kemur inn til IRF. Hann gongur sera høgt upp í, at plastið skal vera væl skilt, tí tá letur tað seg best endurvinna, og tá loysir tað seg eisini best fíggjarliga fyri IRF at senda tað av landinum. Plast-uppgávuna tekur Magnus í størsta álvara, og Poul hevur tí til stuttleika útnevnt Magnus til plast-ministara hjá IRF.

Umframt at vera arbeiðssamur, hevur tað eisini víst seg, at Magnus dugir væl at fanga ymiskt, sum eyðkennir starvsfelagar hansara, og hann dugir ómetaliga væl at herma eftir fólki. Hann ger tað altíð við einum serligum brosi í eyganum, og tað er mangan látur, tá ið Magnus hevur eina nýggja eygleiðing at vísa fram.

„Tað kann ikki lýsast við orðum, hvussu nógv Magnus hevur ríkað lívið hjá okkum í høllini," greiðir Poul frá og heldur fram: „Eg dugi ikki at síggja mín arbeiðsdag uttan Magnus. Tað er altíð hugaligt at koma til arbeiðis, tí hann er so fittur, jaligur og trúgvur sum fáur."

# **Kunningardagar** fyri kommunur

Í november varð skipað fyri kunningardøgum fyri starvsfólk á kommunuskrivstovum í limakommunum hjá IRF.

Dagliga hevur IRF sera nógv samskifti og samstarv við kommunuskrivstovurnar, og endamálið við kunningardegnum var at greiða frá nýggju reglugerðini hjá IRF og at umrøða, hvussu vit kunnu fáa greiðari og einfaldari mannagongdir millum kommunuskrivstovurnar og IRF.

Undirtøkan til kunningartiltakið var sera góð, og starvsfólk frá 15 ymiskum limakommunum luttóku. Fyrst var ein framløga á skránni, og síðani var rundvísing úti á Hagaleiti. Fleiri av teimum vitjandi hava starvast í meira enn 20 ár hjá kommununum, men hava ongantíð áður verið á vitjan úti á Hagaleiti.

Ætlanin er, at eitt líknandi tiltak skal vera afturvendandi, møguliga annaðhvørt ár.



*Durita Toftegaard hevur framløgu fyri starvfólkum frá kommunuskrivstovum kring landið.*



# IRF dyrkar sítt egna grønmeti



*Broyskin, heimadyrkað salat.*

Á vári í 2022 varð skipað fyri plantuskeiði fyri starvsfólk hjá IRF. Hetta skeiðið var í samsvari við umhvørvis-politikk felagsins, har dentur er lagdur á, at øll nýtsla og framleiðsla hjá IRF skal vera ábyrgdarfull og burðardygg.

Á skeiðnum vórðu ymisk fræ sáað, bæði til starvsfólkini at taka við heim og til felags kálgarðin á Hagaleiti. Plantukassarnir í kálgarðinum vórðu gjørdir úr endurnýtslutilfari.

Í summar bar til hjá starvsfólkunum at eta heimadyrkað icebergsalat, rukkola, kili, tomatir, basilikum, grasleyk og dild.

### Virðing fyri góðu matvørunum

Hóast tað bæði er skjótari og lættari at keypa grønmeti í matvøruhandlum, eru nógvir ágóðar av at dyrka egið grønmeti. Fyri tað fyrsta fært tú eina heilt aðra virðing fyri matvøruni, og harumframt veitst tú, at heimadyrkað grønmeti ikki er sproytað við dálkandi evnum, og at einki dálkandi útlát hevur verið av at flyta grønmetið til Føroya.





*Plantukassarnir eru úr endurnýtslutilfari.*



*Moldin verður blandað í plantukassarnar.*



*Úrtøkan úr kálgarðinum var góð í fleiri mánaðir.*

## Matendurvinning gevur góðskumold

Úrtøkan úr kálgarðinum varð liðug á heysti í 2022. Matleivdirnar frá køkinum hjá IRF, sum fara í bokashispannir, verða nú hagreiddar niður í plantukassarnar í kálgarðinum. Á henda hátt verða matleivdirnar til mold, samstundis sum vit fáa ríkað gomlu moldina við nýggjum føðsluevnum.

## Nógvir fyrimunir við matendurvinning

Tá ið vit endurvinna matleivdir, verður virðismikla tilfeingið í matleivdunum hildið í ringrás heldur enn at verða brent. Harafturat eru matleivdir sera ríkar í føðsluevnum, og tí minka vit um tørvin at innflyta kunsttøð. Vit minka eisini um tørvin at innflyta eins nógva mold, tá ið vit í størri mun framleiða okkara egnu mold.

Ein annar stórur fyrimunur við at skilja matleivdir frá vanliga húsarhaldsburturkastinum er, at tú fært eyguni upp fyri matoyðsli, og tú gerst meira tilvitaður um, hvussu nógvan mat tú koyrir burtur.




# **IRF** MENT **FØROYSKT** TILFAR TIL BØRN UM **UMHVØRVI** OG **BURTURKAST**

Sum lið í at menna upplýsingartilfar um umhvørvi og skiljing av burturkasti hevur IRF gjørt eitt spæl og eitt uppgávuhefti. IRF-spælið er serliga ætlað børnum í aldrinum 4-12 ár, men er eisini væl egnað sum eitt familjuspæl, tí endamálið er at fáa bæði børn og vaksin at hugsa meira um burturkastøkið. IRF-heftið, sum er ætlað 6-7 ára gomlum, hevur ymiskar uppgávur til børnini at loysa um m.a. skiljing, endurvinning og endurnýtslu. Tilfarið er ment í samstarvi við Angelu og Hannibal.

Við skúlaársbyrjan í 2022 fingu allir forskúlar og skúlabólkar í limakommununum hjá IRF tilboð um at fáa tilfarið og um at koma á vitjan úti á Hagaleiti. Nógvar av limakommununum hava tikið av tilboðnum um at fáa spøl og heftir, og fleiri teirra hava eisini verið á vitjan hjá IRF. Í 2022 fóru 500 spøl og 650 heftir út til børn í limakommununum hjá IRF, og bæði stór og smá hava tikið sera væl ímóti tilfarinum.

Tað ber til at taka tilfarið niður á www.irf.fo.





# **Nógvar vitjanir** á Hagaleiti í 2022

At vit í Føroyum gerast meira umhvørvisáhugað, er sjónligt úti á Hagaleiti, har alsamt fleiri vitjanir eru á skrá. Á vári í 2022 lótu støðirnar endiliga upp aftur fyri vitjandi, eftir at korona tvey tey seinastu árini hevur avmarkað vitjanirnar.

Vit fáa javnan vitjanir av barnagørðum, fólkaskúlum, miðnámsskúlum, stovnum, arbeiðsplássum og kommunum. Í 2022 høvdu vit eisini vitjan av Umhvørvis- og vinnumálaráðnum.

Tá ið vitjandi eru á Hagaleiti, verður byrjað við einari framløgu, har greitt verður frá virkseminum hjá IRF og at skilja burturkast. Síðani verður farið í móttøkuhøllina, endurvinningarhøllina, oljureinsiverkið, serhøllina og brennistøðina. Vitjanin verður sjálvandi lagað eftir teimum vitjandi, og bæði børn og vaksin fáa nógv burturúr. Eftir vitjanina eru tey betur upplýst um burturkastøkið í Føroyum og um týdningin av at skilja burturkastið.

Við tí fyri eyga at gera vitjanirnar alsamt meira spennandi og ítøkiligar fyri børnini fekk IRF í 2022 eina jarnframsýning í ovnhøllina á brennistøðini.

Á framsýningini eru brendir jarnlutir, sum eru tiknir úr øskuni frá brennistøðini, og jarnlutirnir eru lættir hjá børnum at kenna aftur úr gerandisdegnum. Endamálið við framsýningini er at varpa ljós á, at jarn er virðismikið tilfeingi, sum ikki eigur at verða brent, men at verða latið til endurvinning. Jarn kann endurvinnast umaftur og umaftur, og tað krevur minni orku at framleiða nýggjar lutir úr endurvunnum tilfari enn úr nýggjum rávørum.

Framsýningin vísir somuleiðis, at alt, sum verður latið í gráa posan til brenning, ikki verður burtur. Brendu jarnleivdirnar fylla nógv í øskuni frá brennistøðini, og í løtuni verður hetta jarnið tyrvt saman við øskuni. Tí er tað sera týdningarmikið, at jarn og metal verða skild frá til endurvinningar og ikki verða brend.







# Hvussu fyrireika Føroyar seg til at handfara brúkt battarí úr el- og hybridbilum á **tryggan og skynsaman** hátt?

Elbilaídnaðurin hevur tikið dik á seg mangastaðni í heiminum. Føroyar eru einki undantak, og seinastu fáu árini er eyðsýnt, at okkurt er hent á landsins elbilamarknaði. Sambært Akstovuni vóru 1.540 hybridbilar og 1.210 elbilar í Føroyum pr. 31. desember 2022. At tað gerast fleiri el- og hybridbilar á føroysku vegunum hevur við sær, at ein loysn má finnast á, hvussu brúktu battaríini skulu endurvinnast í næstu framtíð. Higartil hevur IRF ikki móttikið nakran el- ella hybridbil, men Kommunala Brennistøðin hevur tikið ímóti einum elbili, einum gomlum hybridbili (frá 2005) og nøkrum modulum. Í løtuni liggja hesi battarí og bíða til víðari viðgerð.

## KB og IRF við í verkætlan

Kommunala Brennistøðin (KB) og IRF hava í tvey ár verið partur av eini verkætlan við endamálinum at gera trygdarleiðreglur og mannagongdir fyri, hvussu battarí frá el- og hybridbilum skulu handfarast, tá tey skulu endurvinnast. Í verkætlanini hevur støðið verið tikið í umstøðunum í Føroyum, Íslandi og Grønlandi, sum øll kunnu samanberast, tí talan er um norðurlendsk oyggjalond við fáum íbúgvum, har fjarstøðan til restina av Evropa er stór.

## Er møguligt at endurnýta brúkt battarí í Føroyum?

Verkætlanin hevur víst, at áhugi er í øllum trimum londum fyri at varðveita brúkt battarí, sum enn rigga, so at megin í slíkum battaríum kann verða endurnýtt. Til dømis kann talan vera um orkugoymslu til privata nýtslu, løðistøðir ella til aðrar orkuloysnir. Tó eru nakrar avbjóðingar við endurnýtslu, tí ymisku bilmerkini, m.a. orsakað av trygdarávum, ikki geva atgongd til battaríumsitingarskipanir.

Hetta merkir, at tey, ið vilja nýta modul úr battaríum til onnur endamál t.d. orkugoymslu, noyðast at fara uttan loyvi inn í skipanina, og tí ikki kunnu veita garanti fyri vøruna. At hetta verður skipað á ein betri hátt, er ein fortreyt, um fleiri luttakarar skulu á endurnýtslumarknaðin.

## Umhvørvisviðgerð og trygdarreglur

Tá ið verkætlanin fór í gongd í 2020 var endamálið at hava eina lidna loysn fyri, hvussu KB og IRF skuldu skipa umhvørvisviðgerð av el- og hybridbilum í Føroyum. KB og IRF samstarva longu sum er um at umhvørvisviðgera allar aðrar bilar, sum verða beindir burtur í Føroyum.



Verkætlanin vísti tó skjótt, at umhvørvisviðgerð av el- og hybridbilum er meira torgreidd enn væntað. Akkumulatorar, ið eru brúktir í bilum eru allir í høvuðsheitum eins uppbygdir, meðan battaríini í el- og hybridbilum eru framleidd á ymiskan hátt, alt eftir hvørji krøv og samstarvsfelagar ymisku bilamerkini hava. Av tí at battaríini hjá bilmerkjunum eru ymisk, er eingin felags leistur ella útbúgving til at handfara hesi battarí í dag.

Fyri KB og IRF er sera týdningarmikið, at trygdarreglurnar á viðgerðarstaðnum eru í lagi og at mannagongdir fyri ymisku sløgini av battaríum verða gjørdar, so ongin skaði stendst av handfaringini av brúktum battaríum.



*Battarí úr elbili.*

## Arbeiðið víðari

Norðurlendska verkætlanin, sum KB og IRF hava verið partur av, er nú liðug, men av tí, at tilgongdin hevur víst seg at vera meira torgreidd enn væntað, er eingin endaliga loysn til, hvussu ein skipan kann gerast fyri endurvinning av battaríum í Føroyum, men verkætlanin hevur víst á, hvørjir manglar eru.

Við støði í hesum fara KB og IRF nú í samráð við myndugleikarnar um at gera uppskot til eina skipan fyri handfaring og endurvinning av battaríum til el- og hybridbilar. Neyðugt er at tryggja, at skipanin fyri umhvørvisgjald tryggjar umhvørvisviðgerð av øllum bilum, eisini el- og hybridbilum. Umhvørvisviðgerðin skal vera trygg fyri starvsfólkini og skal samstundis tryggja, at tilfeingið í battarínum verður hildið í ringrás.

Eisini er ætlanin at skipa fyri tiltaki í 2023, ið snýr seg um tilbúgving, har allir áhugabólkar eru vælkomnir. Út frá hesum tiltaki, er ætlanin at dagføra tilfarið frá verkætlanini, og vónandi fáa tað við í eina yvirskipaða tilbúgvingarætlan fyri Føroyar.

# HAGTØL 2022



Alt burturkast, sum IRF tekur ímóti, verður viðgjørt eftir trimum høvuðsháttum: Endurvinning, brenning og tyrving. Endurvinningarburturkast er tilfar, ið kann verða til nýggjar vørur, t.d. papp ella jarn. Burturkast, ið ikki kann endurvinnast, t.d. blandað húsarhaldsrusk, verður brent, og ein partur av hitanum frá brenningini verður orkuútvunnin og nýttur til fjarhita. Burturkast, ið hvørki kann endurvinnast ella brennast, t.d. gips, verður tyrvt. IRF arbeiðir fram ímóti, at so nógv burturkast sum gjørligt verður endurvunnið, í aðru atløgu brent og í síðsta enda tyrvt. IRF hevur sett eitt framsøkið langtíðarmál fyri 2030, sum er, at 50% av burturkastinum skal endurvinnast, 47% brennast og í mesta lagi 3% tyrvast.

Í 2022 tók IRF ímóti 37.955 tonsum av burturkasti, og av hesum varð størsti parturin, 23.378 tons, brendur, 12.026 tons endurvunnin og 2.551 tons tyrvd (Talva 1).

**Talva 1** – Burturkastnøgdir, sum IRF tók ímóti í 2020-2022. Fyri at kunna samanbera hagtøl eru nøkur tøl umroknað frá $m^3$ til tons.

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Endurvinning | 12.026 | 13.849 | 11.687 |
| Orkuútvinning (brenning) | 23.378 | 25.080 | 24.728 |
| Tyrving | 2.551 | 3.191 | 4.316 |
| **Tilsamans** | **37.955** | **42.121** | **40.731** |

**Ritmynd 1** – Býtið millum bólkar 2022




Býtið millum endurvinning, brenning og tyrving seinastu 5 árini



Talva 2 vísir vøkstur og minking í burturkastmongdunum seinastu trý árini. Í 2022 var ein 9,9% lækking í burturkastmongdunum samanborið við 2021. Ein minking er í øllum bólkum, og størsta minkingin er í nøgdunum av tyrviburturkasti, sum minkaðu við 20,1%. Ein av orsøkunum til stóru minkingina av tyrviburturkasti er, at síðan stóru umvælingina av brennistøðini í 2018 hevur IRF nú so mikið høga brenniorku, at tað ikki longur er neyðugt at tyrva timbur og annað brenniburturkast, sum annars hevur verið gjørt av neyð. Nøgdirnar av burturkasti at brenna lækkaðu 6,8% í 2022, og hetta er fyrstu ferð, at brenninøgdirnar lækka síðan 2016. Nøgdirnar til endurvinningar eru lækkaðar 13,2% samanborið við 2021. Nøgdirnar av endurvinningarburturkasti ávirkast hvørt ár av, hvussu nógvar avskipingar av jarni hava verið í árinum, og hvussu hesar avskipingarnar falla í mun til ársskiftið. Í 2022 vóru tvær avskipingar av jarni, í 2021 vóru tríggjar og í 2020 vóru tvær. Hvør avskiping inniheldur 1.000-2.000 tons av jarni, og tí hava avskipingarnar í árinum stóra ávirkan á samlaðu endurvinningarhagtølini.

**Talva 2** – Vøkstur og minking í burturkastnøgdum 2020-2022

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Endurvinning | -13,2% | 18,5% | -4,3% |
| Orkuútvinning | -6,8% | 1,4% | 0,6% |
| Tyrving | -20,1% | -26,1% | -17,0% |
| **Tilsamans** | **-9,9%** | **3,4%** | **-3,0%** |

## Hvaðani kemur burturkastið?

IRF tekur ímóti burturkasti frá húsarhaldum, kommunalum endurvinningarplássum og vinnu. Fólkatalið í IRF økinum vaks við 1% frá 30.926 1. januar í 2022 til 31.198 1. januar í 2023. Talið av húskjum er økt frá 10.897 til 10.993, men talið av kommunalum endurvinningarplássum er óbroytt seinastu árini (talva 3). Í 2022 hevði IRF 560 aktivar vinnukundar samanborið við 551 vinnukundar í 2021. Vinnukundarnir eru m.a. frá ali-, byggi-, fiski-, flutnings-, handils- og tænastuvinnu og frá landbúnaði og stovnum.

**Talva 3** – Fólkatal, húski, kommunal endurvinningarpláss og vinnukundar 2020-2022

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Fólkatal | 31.198 | 30.926 | 30.559 |
| Húski | 10.993 | 10.897 | 10.768 |
| Kommunal endurvinningarpláss | 41 | 41 | 41 |
| Vinnukundar | 560 | 551 | 545 |

## Kommunal endurvinningarpláss

Í teimum 28 limakommununum hjá IRF eru tilsamans 41 kommunal endurvinningarpláss. Tað eru limakommunurnar, sum eiga og reka tey kommunalu plássini. 21 kommunur hava eitt endurvinningarpláss, fimm kommunur hava tvey pláss og tvær kommunur hava fimm pláss. Endurvinningarplássini eru sera ymisk í stødd. Tey stóru plássini eru umleið 1.000-3.000 $m^2$ til støddar, tey smáu plássini eru á leið 50-100 $m^2$.

Av teimum 28 burturkastbólkunum, sum IRF í dag heintar frá endurvinningarplássunum, hava tey ymsu plássini í verandi løtu í miðal 19 burturkastbólkar. Tað merkir, at alt eftir hvar í landinum ein borgari býr, hevur viðkomandi ymsar møguleikar at skilja burturkastið, og tað er sostatt eisini ymiskt, hvussu nógv burturkast borgarin hevur møguleika at skilja frá til endurvinningar. Kommunalu endurvinningarplássini eru týdningarmikil liður í arbeiðinum at náa málinum um 50% endurvinning í 2030, og tí er tað neyðugt, at menningin av plássunum verður hægri raðfest og betur skipað komandi árini.

Samantalt tók IRF í 2022 ímóti 8.605 tonsum av burturkasti frá hesum plássunum, og tað svarar til 276 kg burturkast fyri hvønn borgara í 2022.

Kommunalu endurvinningarplássini og burturkast fyri hvønn borgara



41 endurvinningarpláss kring landið




8.605 tons av burturkasti frá endurvinningarplássum í 2022




276 kg av burturkasti pr. borgara frá endurvinningarplássum í 2022

## Endurvinning

Talva 4 vísir samlaðu nøgdirnar av tí, sum IRF savnaði inn til endurvinningar í 2022. Hvør bólkur sær er útgreinaður í talvunum 7-14.

Um IRF skal røkka málinum at endurvinna 50% av øllum burturkastinum í 2030, skulu stór átøk gerast á endurvinningarøkinum. Bæði borgarar og vinna skulu gerast raskari at skilja burturkast í teir bólkar, ið longu nú kunnu endurvinnast, og IRF skal arbeiða við at fáa fleiri burturkastbólkar til endurvinningar heldur enn at brenna og tyrva teir. Í 2022 eydnaðist tíverri ikki at flyta nakran nýggjan bólk frá brenning ella tyrving til endurvinningar.

**Talva 4** – Burturkastnøgdir til endurvinningar 2020-2022 (tons)

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Jarn og metal | 2.644 | 4.059 | 2.204 |
| Papp og pappír | 2.597 | 2.658 | 2.464 |
| Plast | 1.262 | 1.194 | 867 |
| Serburturkast | 128 | 125 | 134 |
| Elektronikkur og káplar | 104 | 123 | 157 |
| Glas | 27 | 11 | 0 |
| Spillolja | 1.276 | 1.897 | 1.805 |
| Reinsað vatn latið á sjógv | 3.988 | 3.781 | 4.056 |
| **Tilsamans, tons** | **12.026** | **13.849** | **11.687** |

## Útflutningur

IRF sendir nógvar ymiskar burturkastbólkar til viðgerðar uttanlands. Tað mesta fer til endurvinningar, men partar av ávísum serliga dálkandi burturkastbólkum verða brendir ella tyrvdir í útlandinum. Av øllum tí burturkastinum, sum IRF sendir uttanlands til endurvinningar, er eisini altíð ein lítil partur, sum, orsakað av dálking ella skeivari skiljing, ikki verður endurvunnin, men í staðin brendur ella tyrvdur. Hjá IRF merkja vit stóran áhuga frá bæði borgarum, fyritøkum og ikki minst frá næmingum, sum vilja vita, hvar burturkastið endar, og hvussu IRF kann tryggja, at burturkastið verður rætt viðgjørt á umhvørvisliga besta hátt. IRF arbeiðir miðvíst við at fylgja útflutta burturkastinum og at fáa so væl útgreinaði hagtøl sum gjørligt, soleiðis at vit kunnu skjalprógva veruliga endurvinningarpartin, og at vit á tann hátt støðugt kunnu arbeiða við at menna henda partin.

**Talva 5** – Burturkastnøgdir til viðgerðar uttanlands 2020-2022 (tons)

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Endurvinning | 6.762 | 8.171 | 5.825 |
| Brenning | 396 | 118 | 193 |
| Tyrving | 21 | 17 | 11 |
| **Tilsamans** | **7.180** | **8.306** | **6.029** |

Talva 6 vísir burturkastbólkarnar, ið vórðu sendir til viðgerðar uttanlands í 2022. Talvan útgreinar, hvussu stórur partur av hvørjum bólki varð ávikavist endurvunnin, orkuútvunnin og tyrvdur. Av 7.180 tonsum, ið vóru send til viðgerðar uttanlands, vórðu 6.762 tons endurvunnin, 396 tons brend og 21 tons tyrvd. Hetta svarar til, at 94,2% vórðu endurvunnin, 5,5% vórðu brend og 0,3% vórðu tyrvd.

**Talva 6** – Burturkastbólkar til viðgerðar uttanlands 2022 (tons)

| | Útflutt | Endurvinning | Orkuútvinning | Tyrving |
|---|---|---|---|---|
| Papp og pappír | 2.597 | 2.597 | - | - |
| Plast | 1.262 | 1.262 | - | - |
| Jarn og metal | 2.684 | 2.644 | 40 | 0 |
| Elektronikkur | 132 | 104 | 21 | 7 |
| Serburturkast | 412 | 128 | 281 | 3 |
| Glas | 27 | 27 | - | - |
| Matolja | 32 | - | 32 | - |
| Annað | 35 | - | 23 | 12 |
| **Tilsamans** | **7.180** | **6.762** | **396** | **21** |

## Jarn og metal

Í 2022 sendi IRF 2.684 tons av jarni og metalum til endurvinningar (Talva 7). Hesin burturkastbólkur verður smeltaður um til nýggjar lutir ella nýtt tilfeingi og kann endurvinnast nógvar ferðir. Størsti bólkurin í 2022 er blandað jarn við 1.993 tonsum. Hetta talið vísir seg at vera skiftandi frá ár til árs, alt eftir hvussu nógvar avskipingar av jarni eru, og hvussu tær falla í mun til ársskiftið. Í 2020 vóru tvær avskipingar, í 2021 tríggjar og í 2022 vóru aftur tvær.

Í 2022 tók IRF ímóti 498 bilvrakum, ið svara til 598 tons. Øll bilvrak, sum IRF tekur ímóti, verða send til Kommunalu Brennistøðina á Hjalla til umhvørvisviðgerð, áðrenn tey verða send av landinum sum gamalt jarn. Sostatt eru tølini fyri bilvrakini hjá IRF eisini roknað við í samlaðu tølini hjá Kommunalu brennistøðini.

Í 2022 vórðu eisini 62 tons av øðrum metalum, so sum kopari, aluminiumi, blýggi og rustfríum stáli, send til endurvinningar uttanlands. IRF skilir hesi metal frá jarninum fyri at virðisøkja metalið og fáa ein betri sølupris. IRF sendi 31 tons av aluminiumsdósum frá pantskipanini til endurvinningar í 2022, tað er 19% meira enn í 2021.

**Talva 7** – Jarn og metal til endurvinningar 2020-2022 (tons). Miðalvektin á bilvrakum í hagtølunum er ásett at vera 1,2 tons.

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Jarn | 1.993 | 3.403 | 1.436 |
| Bilvrak | 598 | 641 | 710 |
| Annað metal | 62 | 58 | 60 |
| Aluminiumsdósir | 31 | 26 | 27 |
| **Tilsamans** | **2.684** | **4.127** | **2.233** |

## Pappír og papp

Endurvinningarhøllin á Hagaleiti tekur ímóti pappíri og pappi úr øllum landinum, og tí skal viðmerkjast, at mongdirnar av pappi og pappíri úr Tórshavnar kommunu eisini eru roknaðar við í hagtølini hjá IRF. Í 2022 var samlaði útflutningurin 2.597 tons, og tað er 2% minni enn í 2021 (Talva 8).

PAPP OG PAPPÍR

**Talva 8** – Mongdir av pappi og pappíri til endurvinning 2020-2022 (Tons)

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Pappír | 410 | 585 | 529 |
| Papp | 2.187 | 2.072 | 1.935 |
| **Tilsamans** | **2.597** | **2.658** | **2.464** |

## Plast

IRF er ment nógv seinastu árini, tá ið tað snýr seg um plastendurvinning, og í 2022 vórðu 1.262 tons av plasti send til endurvinningar (Talva 9). Størsti plastbólkurin til endurvinningar í 2022 var eins og undanfarin ár stórsekkir við 381 tonsum, meðan størsti vøksturin var í aliringum og fóðurslangum við 62% úr 133 tonsum upp í 216 tons. Stóri vøksturin stendst av, at IRF í 2022 skifti til ein nýggjan móttakara av hesum burturkastbólkinum, og nú ber til at endurvinna størri partar av aliringunum. Ein lækking var í nøgdini av troli, men ein stórur 16% vøkstur var í pantfløskum, og nøgdirnar av bleytum plasti hækkaðu við 30%, sí talvu 9.

BLEYTT PLAST

**Talva 9** – Plast til endurvinningar 2020-2022 (tons)

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Trol, trossar og net | 229 | 257 | 278 |
| Stórsekkir (PP) | 381 | 392 | 277 |
| Aliringar og fóðurslangur (HDPE) | 216 | 133 | 140 |
| Pantfløskur (PET) | 112 | 97 | 94 |
| Bleytt vøruplast (LDPE) | 113 | 87 | 73 |
| Annað hart plast | 0 | 18 | 5 |
| Graslíkisvøllir | 211 | 211 | - |
| **Tilsamans** | **1.262** | **1.194** | **867** |



## Serburturkast

Til henda burturkastbólkin hoyrir tað burturkast, sum inniheldur serliga dálkandi evni, ið ikki mugu enda í náttúruni. Heitið 'serburturkast' er ein samanseting av orðunum 'serviðgerð' og 'burturkast'. Nakað av serburturkasti verður brent á góðkendum brennistøðum í útlondum, men aðrir bólkar verða partvíst endurvunnir. Tá er mannagongdin tann, at dálkandi evni fyrst verða burturbeind á tryggan hátt, og síðan verða metal og glas endurvunnin. Til dømis verða 65% av spreydósunum, sum IRF sendir av landinum, endurvunnar, 62% av battaríunum og 81% av ljósperunum.

Samanlagt sendi IRF 412 tons av burturkasti til serviðgerð í 2022 (Talva 10). Størsta mongdin var evja frá nótavaski við 264 tonsum, ið verður brend í Svøríki. Orsøkin til hesar stóru nøgdirnar er, at mestsum eingin evja varð send av landinum í 2020-2021, tí arbeitt var við at fáa evjuna brenda í Føroyum. Hetta bar tó ikki á mál, og tí fara umleið 50-100 tons av evju at verða send av landinum árliga til brenningar, til vinnan velur at viðgera nótirnar við øðrum evnum enn kopari. IRF sendi eisini 4 tons av kemikalium til brenningar í útlondum í 2022. Artisk Kommando tekur sær av øllum gomlum fýrverki og krúti, sum kemur inn til IRF, og í 2022 sprongdi Artisk Kommando 300 kg av fýrverki frá IRF.

Av tí serburturkastinum, sum verður endurvunnið, varð størsti bólkurin køli- og frystiskáp við 73 tonsum og næststørsti bólkurin varð akkumulatorar við 48 tonsum. Eisini vóru 9 tons av trýstfløskum, 8 tons av battaríum, 3 tons av ljósperum og 2 tons av spreydósum send til endurvinningar.

**Talva 10** – Mongdir av serburturkasti 2020-2022 (tons).

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Evja frá nótavask | 264 | 0 | 50 |
| Køli- og frystiskáp | 73 | 73 | 71 |
| Akkumulatorar | 48 | 48 | 64 |
| Trýstfløskur | 9 | 4 | 4 |
| Battaríir | 8 | 10 | 8 |
| Kemikaliuburturkast | 4 | 4 | 3 |
| Ljósperur | 3 | 3 | 3 |
| Spreydósir | 2 | 3 | 2 |
| Fýrverk | 0,3 | 1 | 1 |
| **Tilsamans** | **412** | **145** | **205** |

## Elektronikkur

Í 2022 útflutti IRF 132 tons av káplum og elektronikki til endurvinningar. Av hesum vóru 110 tons elektronikkur og 22 tons káplar (Talva 11). Tað er sera týdningarmikið fyri IRF, at elektronikkur og káplar, sum innihalda nógv metal, fara til endurvinningar og ikki verða brend, tí talan er um virðismikið tilfeingi, sum kann endurvinnast umaftur og umaftur.

**Talva 11** – Mongdir av elektronikki og káplum til endurvinningar 2020-2022 (tons)

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Elektronikkur | 110 | 110 | 138 |
| Káplar | 22 | 41 | 53 |
| **Tilsamans** | **132** | **151** | **191** |

## Glas

IRF fór undir at savna glas til endurvinningar í 2020, og fyrsta sendingin av glasi, sum var 10 tons, fór av landinum í 2021. Í 2022 er nøgdin meir enn tvífaldað og vórðu 27 tons send til endurvinningar (Talva 12).

Glas er burturkastbólkur, sum er ókeypis hjá kommununum at sleppa av við, men hóast tað eru enn bert 17 av teimum 41 kommunalu endurvinningarplássunum, sum hava taka ímóti glasi frá borgarunum. Sostatt er enn nakað eftir á mál á hesum økinum.

IRF sendir bæði litað og klárt glas til endurvinningar, og umhvørvisliga loysir tað seg sera væl at endurvinna glas, tí at framleiða vørur úr endurvunnum glasi er ikki eins orkukrevjandi, sum at framleiða glas úr nýggjum rávørum. Við glasendurvinning er ikki neyðugt at framleiða nýtt glas, og útvinning av rávørum og útlát av vakstrarhúsgassum minkar.

**Talva 12** – Mongdir av glasi til endurvinningar 2020-2022 (tons)

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Glas | 27 | 11 | 0 |

Frá 2021 til 2022 øktist innsavningin av húsarhaldsglasi við 145%






## Matolja

IRF hevur seinastu fýra árini sent matolju av landinum, har hon verður reinsað og nýtt í staðin fyri annað lívrunnið brennievni. Í 2022 sendi IRF 32 tons av landinum, og tað er ein stór øking samanborið við árini fyri, tá ið 10 tons vórðu send av landinum.

Seinastu árini hevur IRF gjørt nógvar góðskukanningar av matoljuni, og frá 2023 fer matoljan ikki longur at verða send av landinum, men í staðin latin oljureinsiverkinum hjá IRF. Matoljan fer frameftir at verða gagnnýtt í Føroyum, eins og tann reinsaða spilloljan og tað oljudálkaða vatnið verða.

**Talva 13** – Mongdir av matolju 2020-2022 (tons)

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Matolja | 32 | 10 | 10 |

## Spillolja og oljudálkað vatn

Oljureinsiverkið hjá IRF tók ímóti 5.478 tonsum av spillolju og oljudálkaðum vatni í 2022. Samanlagt reinsaði og seldi verkið 1.276 tons av olju í 2022 (talva 14). Umframt at reinsa olju, reinsar verkið eisini vatn, sum verður latið á sjógv. Tað, sum síðan er eftir, verður kallað evja, og hon verður brend á brennistøðini á Hagaleiti. Í 2022 vórðu 3.988 tons av vatni reinsað og 214 tons av evju brend.

**Talva 14** – Hagtøl fyri oljureinsiverkið 2019-2022

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Spilloljusøla | 1.276 | 1.897 | 1.805 |
| Reinsað vatn latið á sjógv | 3.988 | 3.781 | 4.056 |
| Evja frá oljureinsiverkinum | 214 | 185 | 253 |
| **Móttikið á oljureinsiverkinum** | **5.478** | **5.864** | **6.114** |



## Brenning

Í 2022 tók IRF ímóti 22.981 tonsum av burturkasti at brenna. Av hesum vórðu 22.917 tons brend á Hagaleiti og 64 tons vórðu brend á Hjalla, tí brennistøðin á Hagaleiti lá still í sambandi við umvælingar (Talva 15). Árið fyri í 2021 vóru 24.963 tons brend, og sostatt er talan um eina 8% minking av brenniburturkasti. Seinast IRF kundi skráseta eina minking í nøgdunum av burturkasti at brenna var í 2016.

**Talva 15** – Burturkast til brenning í Føroyum 2020-2022 (tons)

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Burturkast á goymslu við ársbyrjan | 0 | 0 | -1.544 |
| Burturkast brent á Hagaleiti | 22.917 | 24.891 | 25.945 |
| Burturkast brent á Hjalla | 64 | 71 | 134 |
| Burturkast á goymslu við árslok | 0 | 0 | 0 |
| **Móttikið burturkast at brenna í alt** | **22.981** | **24.963** | **24.535** |

Brennistøðin var í rakstri 7.888 tímar í 2022. Tað svarar til, at ovnurin var sløktur í 36 dagar (Talva 16). Ovnurin brendi í miðal 2,9 tons um tíman, sum svarar til 69 tons um samdøgrið.

**Talva 16** – Rakstrarhagtøl brennistøðin 2020-2022 (tons)

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Brennitímar | 7.888 | 8.096 | 8.347 |
| Dagar, ið brennistøðin liggur still | 36 | 28 | 18 |
| Brent hjá IRF, tons/tíma | 2,9 | 3,1 | 3,1 |
| Brent hjá IRF, tons/dag | 69 | 74 | 75 |

Orkuframleiðslan hjá brennistøðini var 66.578 MWh í 2022, og av hesum vóru 20.545 MWh veittir sum fjarhiti til Høvdavirkið og til IRF á Hagaleiti (Talva 17). Tað svarar til, at nýtslustigið av fjarhitanum er 31%, sum er væl hægri enn í 2021.

**Talva 17** – Orkuframleiðsla og fjarhitanýtsla 2020-2022 (MWh)

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Orkuframleiðsla | 66.578 | 70.352 | 73.596 |
| Veittur fjarhiti | 20.545 | 14.765 | 16.389 |
| Veittur fjarhiti í % | 31% | 21% | 22% |

Í 2022 vórðu samanlagt 3.212 tons av ilsku frá brennistøðini tyrvd á tyrvingarplássinum í Nýggjheiðum. Hetta svarar til 140 kg av ilsku fyri hvørt tons av brendum burturkasti (Talva 18). Ilska er botnøskan úr ovninum, ella sagt við øðrum orðum: tað, sum er eftir, tá ið burturkastið er brent. Tess verri burturkastið er skilt, tess meira jarn, glas og annað er í brenniburturkastinum, og tess størri nøgdir av ilsku fáa vit. Tað er sera vanligt, at starvsfólkini hjá IRF sær felgur, borðbúnað, amboð, stórar ketur, dósir og mangt annað í ilskuni.

IRF hevur eina roykreinsiskipan, ið brúkar kálk og aktivt kol til at reinsa roykin. Tað, sum verður reinsað úr roykinum, verður kallað flogøska. Flogøskan, sum er dálkað við m.a. kyksilvuri og kadmium, verður tyrvd í Noregi á góðkendum stað. Úr roykreinsiskipanini komu 422 tons av flogøsku frá brennistøðini í 2022, sum svarar til 18 kg av flogøsku fyri hvørt brent tons av burturkasti.

**Talva 18** – Mongdir av ilsku og flogøsku (restproduktum) 2020-2022

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Ilska, tons | 3.212 | 3.402 | 3.563 |
| Ilska pr. brent burturkast, kg/tons | 140 | 137 | 137 |
| Flogøska, tons | 422 | 485 | 469 |
| Flogøska pr. brent burturkast, kg/tons | 18 | 19 | 18 |



## Tyrving




Í 2022 tók IRF ímóti 2.530 tonsum av burturkasti at tyrva (Talva 19). Hetta fevnir m.a. um asbest, PVC-plast, glas- og steinull, gips og keramikk. Íroknað ilsku frá IRF og KB vórðu íalt 7.484 tons tyrvd í 2022.

**Talva 19** – Mongdir av tyrviburturkasti (tons) 2020-2022

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Tyrviburturkast | 2.530 | 3.174 | 4.305 |
| Ilska IRF | 3.212 | 3.402 | 3.563 |
| Ilska KB | 1.742 | 2.036 | 381 |
| **Samanlagt** | **7.484** | **8.612** | **8.249** |

Í 2022 tyrvdi IRF 2.530 tons av burturkasti og 4.954 tons av ilsku. Tilsamans 7.484



## Rottangatøming

Í 2022 vórðu samanlagt 7.834 rottangar tømdir (Talva 20). Samanlagt í IRF økinum eru 13.114 tangar skrásettir í 2022. Evjan frá rottangunum hevur verið løgd í evjubrunnar øll árini, men frá 2023 verður hon avvatnað í nýggja reinsiverkinum hjá IRF í Nýggjheiðum og síðani tyrvd í stórsekkjum. Skiftið í rottangaskipanini hevur eisini við sær, at IRF fær tøl fyri evjumongdir.

**Talva 20** – Rottangatøming 2020-2022

| | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|
| Tal av tømdum tangum | 7.834 | 7.562 | 3.931 |
| **Samlað tal av tangum** | **13.114** | **12.761** | **12.433** |

## Ósjónligt burturkast

Hagtølini, sum eru útgreinað á seinastu síðunum, fevna bert um alt tað burturkastið, sum IRF hevur tikið ímóti og viðgjørt. Tað er nógv annað burturkast í Føroyum t.d. alt tað, sum Kommunala brennistøðin tekur ímóti, og eisini tað, sum fleiri fyritøkur sjálvar senda av landinum til endurvinningar, t.d. metal, net og nótir, elektronikk og klæði.

Í hesum sambandi er tað eisini viðkomandi at nevna alt tað burturkastið, sum stendst av at framleiða eina vøru, tí tað liggur sera nógv burturkast í flestu framleiðslum. Hetta burturkastið er í flestu førum ósjónligt fyri okkum í Føroyum, tí vøran er framleidd aðrastaðni. Sum dømi kann nevnast, at tá ið ein fartelefon verður framleidd, hevur hon 86 kg av burturkasti við sær.

Skulu vit gerast betri til at verja tilfeingið í burturkastinum og til at keypa inn á burðardyggan hátt, so er fyrsta stigið at tosa um hetta ósjónliga burturkastið og gera tað sjónligari soleiðis, at vit lættari kunnu taka burðardyggar avgerðir.



# Høvuðstøl í 1.000 kr

| | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | |
| Kommunugjøld | 40.977 | 39.928 | 39.406 | 39.389 | 38.310 |
| Aðrar inntøkur | 74.782 | 72.842 | 67.842 | 62.135 | 58.361 |
| **Inntøkur tilsamans** | **115.759** | **112.770** | **107.248** | **101.524** | **96.671** |
| | | | | | |
| **Útreiðslur** | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur | 93.397 | 87.098 | 85.250 | 80.317 | 73.303 |
| Avskrivingar | 18.554 | 18.131 | 18.139 | 16.158 | 15.257 |
| Rentuútreiðslur | 3.631 | 3.013 | 3.129 | 3.174 | 3.449 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **115.582** | **108.242** | **106.518** | **99.649** | **92.009** |
| | | | | | |
| **Úrslit** | **177** | **4.528** | **730** | **1.875** | **4.662** |
| | | | | | |
| **Eginogn** | **74.681** | **74.504** | **69.976** | **69.246** | **67.371** |



## Inntøkur 2022–2018




| Inntøkur | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Kommunugjøld | 40.977 | 39.928 | 39.406 | 39.389 | 38.310 |
| Aðrar inntøkur | 74.782 | 72.842 | 67.842 | 62.135 | 58.361 |

## Útreiðslur 2022–2018




| Útreiðslur | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 93.397 | 87.098 | 85.250 | 80.317 | 73.303 |
| Avskrivingar | 18.554 | 18.131 | 18.139 | 16.158 | 15.257 |
| Rentuútreiðslur | 3.631 | 3.013 | 3.129 | 3.174 | 3.449 |

## Ársúrslit 2022–2018




| | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Úrslit | 177 | 4.528 | 730 | 1.875 | 4.662 |

## Eginogn 2022–2018




| | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| Eginogn | 74.681 | 74.504 | 69.976 | 69.246 | 67.371 |



# Gongdin í rakstrinum í 1.000 kr

| | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | |
| Kommunugjøld | 40.977 | 39.928 | 39.406 | 39.389 | 38.310 |
| Virkisburturkast v.m. | 57.193 | 54.683 | 53.137 | 49.740 | 44.529 |
| Oljureinsiverkið | 6.885 | 6.673 | 9.551 | 6.876 | 7.437 |
| Verkstaður | 1.225 | 896 | 1.199 | 1.027 | 876 |
| Søla | 9.479 | 10.590 | 3.955 | 4.492 | 5.520 |
| **Inntøkur tilsamans** | **115.759** | **112.770** | **107.248** | **101.524** | **96.671** |
| | | | | | |
| **Útreiðslur** | | | | | |
| Sáttmálaarbeiði | 1.770 | 1.612 | 1.716 | 1.979 | 2.018 |
| Lønarútreiðslur | 36.381 | 34.378 | 32.805 | 30.722 | 28.704 |
| Orka | 3.345 | 3.046 | 2.962 | 2.889 | 2.667 |
| Tilfar | 3.506 | 2.303 | 2.628 | 2.584 | 1.951 |
| Flutningur | 13.468 | 13.328 | 11.390 | 11.480 | 9.271 |
| Viðgerð uttanlands | 946 | 358 | 729 | 613 | 150 |
| Tyrvingarpláss | 4.503 | 5.392 | 5.553 | 5.129 | 5.364 |
| Størri amboð | 9.979 | 9.011 | 8.632 | 8.843 | 7.805 |
| Skrivstovuhald | 3.507 | 3.358 | 4.526 | 3.854 | 3.588 |
| Maskinanlegg | 4.032 | 2.816 | 2.626 | 2.226 | 2.041 |
| Bygningsumsiting | 492 | 503 | 650 | 304 | 719 |
| Verkstaður, PLC v.m. | 749 | 616 | 756 | 587 | 494 |
| Ferðing og umboðan | 1.137 | 1.035 | 1.391 | 1.302 | 1.372 |
| Uttanhýsistænastur | 1.829 | 2.048 | 1.392 | 1.306 | 1.084 |
| Tryggingar | 1.041 | 1.160 | 1.379 | 977 | 1.081 |
| Starvsfólkaútreiðslur | 6.712 | 6.134 | 6.115 | 5.524 | 4.994 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **93.397** | **87.098** | **85.250** | **80.317** | **73.303** |
| | | | | | |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar** | **22.362** | **25.672** | **21.998** | **21.207** | **23.369** |
| | | | | | |
| **Avskrivingar** | **18.554** | **18.131** | **18.139** | **16.158** | **15.257** |
| | | | | | |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **3.808** | **7.541** | **3.859** | **5.049** | **8.112** |
| | | | | | |
| **Rentur** | | | | | |
| Bankarentur og provisión v.m. | 42 | 33 | 105 | 15 | -18 |
| Prioritetsrentur | 3.589 | 2.980 | 3.024 | 3.159 | 3.468 |
| **Rentur tilsamans** | **3.631** | **3.013** | **3.129** | **3.174** | **3.449** |
| | | | | | |
| **Rakstrarúrslit** | **177** | **4.528** | **730** | **1.875** | **4.662** |

# Rakstrarúrslit samanborið við fíggjarætlan í 1.000 kr

| | Roknskapur | Ætlan | Frávik | Frávik í % |
|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | |
| Kommunugjøld | 40.977 | 40.964 | 13 | 0,0% |
| Virkisburturkast v.m. | 60.078 | 59.253 | 825 | 1,4% |
| Landsstýrisgjald | 4.000 | 4.000 | - | 0,0% |
| Verkstaður | 1.225 | 906 | 319 | 35,2% |
| Søla | 9.479 | 7.223 | 2.256 | 31,2% |
| **Inntøkur tilsamans** | **115.759** | **112.346** | **3.413** | **3,0%** |
| | | | | |
| **Útreiðslur** | | | | |
| Sáttmálaarbeiði | 1.770 | 1.583 | 187 | 11,8% |
| Lønarútreiðslur | 36.381 | 34.422 | 1.959 | 5,7% |
| Orka | 3.345 | 3.417 | -72 | -2,1% |
| Tilfar | 3.506 | 2.501 | 1.005 | 40,2% |
| Flutningur | 13.468 | 12.832 | 636 | 5,0% |
| Viðgerð uttanlands | 946 | 462 | 484 | 104,8% |
| Tyrvingarpláss | 4.503 | 5.459 | -956 | -17,5% |
| Størri amboð | 9.979 | 9.126 | 853 | 9,3% |
| Skrivstovuhald | 3.507 | 3.300 | 207 | 6,3% |
| Maskinanlegg | 4.032 | 2.522 | 1.510 | 59,9% |
| Bygningsumsiting | 492 | 509 | -17 | -3,3% |
| Verkstaður, PLC v.m. | 749 | 474 | 275 | 58,0% |
| Ferðing og umboðan | 1.137 | 1.297 | -160 | -12,3% |
| Uttanhýsistænastur | 1.829 | 1.374 | 455 | 33,1% |
| Tryggingar | 1.041 | 978 | 63 | 6,4% |
| Starvsfólkaútreiðslur | 6.712 | 6.741 | -29 | -0,4% |
| **Útreiðslur tilsamans** | **93.397** | **86.997** | **6.400** | **7,4%** |
| | | | | |
| **Úrslit áðrenn avskrivingar** | **22.362** | **25.349** | **-2.987** | **-11,8%** |
| | | | | |
| **Avskrivingar** | **18.554** | **19.333** | **-779** | **-4,0%** |
| | | | | |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **3.808** | **6.016** | **-2.208** | **-36,7%** |
| | | | | |
| **Rentur** | | | | |
| Bankarentur og provisión v.m. | 42 | - | 42 | 0,0% |
| Prioritetsrentur | 3.589 | 4.126 | -537 | -13,0% |
| **Rentur tilsamans** | **3.631** | **4.126** | **-495** | **-12,0%** |
| | | | | |
| **Rakstrarúrslit** | **177** | **1.890** | **-1.713** | **-90,6%** |

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2022 hjá L/F Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum IRF.

Ársfrásøgnin er sett upp í samsvari við ársroknskaparlógina og galdandi roknskaparleiðbeiningar.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu, rakstrarúrslitinum og peningastreyminum.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Sandavágur, tann 28. apríl 2023

**Stjórn:**

**Poul Andrias Joensen**
Stjóri

**Nevnd:**

| | | |
|---|---|---|
| **Hans Anders Jacobsen**<br>Nevndarformaður | **Jóanis Albert Nielsen**<br>Næstformaður | **Gunvá við Keldu**<br>Nevndarlimur |
| **Alvi Mortensen**<br>Nevndarlimur | **Oluf Müller**<br>Nevndarlimur | **Bjarki Henriksen**<br>Nevndarlimur |

# VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

## Til eigararnar í L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin (IRF)

### Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin (IRF) fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2022 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2022 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2022 samsvarandi ársroknskaparlógini.

### Grundarlag fyri niðurstøðuni

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti „Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin“. Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið hinar etisku skyldurnar, sum ásettar eru í hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapurin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

### Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin

